UTTAN ÚR HEIMI

# Fjórði hvør til reiðar at flyta úr Gaza



*Ariel Sharon, forsætisráðharri, var nú um dagarnar og hugdi at einum øki, sum niðursetufólkini í Gazageiranum skulu búseta seg í*

**Meiri enn ein fjórðingur av teimum jødisku niðursetufólkunum í Gaza-geiranum eru nú til reiðar at flyta haðani. Men mótstøðan er framvegis stór**

FLYTING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska stjórnin hevur boðið teimum umleið 8.000 niðursetufólkunum í Gazageiranum endurgjald, aftur fyri at tey noyðast at flyta frá húsi og heimi. Sambært blaðnum Yedioth Aharonot hava 450 av teimum umleið 1500 húskjunum tikið av tilboðnum frá stjórnini um at búseta seg í bygdum tætt við Miðjarðarhavið.

Nógv niðursetufólk hava hótt við at seta seg upp ímóti myndugleikunum, og summi hava eisini hótt við at taka til vápnini, gerst tað neyðugt. Tí er spenningurin sera stórur, og tað er ivaleyst orsøkin til, at tey, sum hava játtað at flyta, hava sýtt fyri, at teirra nøvn verða almannakunngjørd.

Ísraelska stjórnin sigur, at málið um at niðurleggja fleiri niðursetubygdir verður ikki tikið uppaftur, og at stjórnin fer ikki at slaka fyri trýsti. Mótstøðufólkini hava boðað frá, at tey ætla sær heldur ikki at slaka, og so seint sum annan hvítusunnudag stongdu tey fleiri týðandi vegir um alt landið. Hildið verður, at hetta var fyrireiking til tiltøk, sum ætlandi verða sett í verk, tá afturtøkan úr Gaza verður sett í verk í summar.

# Mugu samstarva fyri at bjarga Deyðahavinum

**Deyðahavið er minkað so nógv, at okkurt má gerast, men málið hevur eisini sera stóran politiskan týdning**

BJARGING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelsmenn, palestinar og jordanar eru samdir um at gera okkurt fyri at bjarga Deyðahavinum. Okkurt má gerast, tí tey seinastu 50 árini er vatnstøðan fallin heilar 27 metrar, og vatnið minkar framvegis.

- Bara tað, at vit kunnu tosa um hetta, er eitt gott politiskt tekin, tí tað gevur vónir um samstarv ímillum londini, sigur ísraelski ráðharrin Benyamin Ben Eliezer, sum júst hevur tingast við sínar palestinsku og jordansku starvsbrøður um málið.

Fyribils hava teir eitt uppskot um at grava ein 180 kilometrar langan tunnil frá Reyðahavinum til Deyðahavið og at leiða vatn tann vegin. Arbeiðið verður mett at kosta næstan 20 milliardir krónur, og Heimsbankin hevur lovað at fíggja meginpartin.

Men enn eru fleiri ósvaraðir spurningar. Summi halda, at tunnilin kann fáa óhepnar avleiðingar fyri tey sjáldsomu koralrivini í Reyðahavinum, og at vatnleiðingin eisini kann fáa aðrar umhvørvisligar avleiðingar.

Deyðahavið, sum er 417 metrar undir havinum, er á markinum ímillum Jordan og Vestara Áarbakka, sum er undir ísraelskum hervaldi, og tann politiski spenningurin hevur higartil forðað øllum ætlanum um at bjarga vatninum, sum er saltari enn nakað annað vatn í heiminum.

-Vit umhugsa málið, og nú skulu allir partar kanna tey umhvørvisligu og búskaparligu árinini, sigur palestinski ráðharrin Ghassan al-Katib við sjónvarpið Al-Jazeera.

## Blair bjóðar av

Afturvaldi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, ætlar sær at fáa Parlamentið at samtykkja ikki færri enn 45 lógaruppskot teir næstu átjan mánaðarnar, og fleiri teirra eru av slíkum slagi, at tey kunnu geva honum trupulleikar.

Eitt nú ætlar Blair at seta í gildi eina lóg um eitt serligt samleikaprógv. Endamálið við tí er at forða fyri, at fólk gera sær dælt av ymsum almennum veitingum, sum tey ikki hava rætt til. Hesum er vinstrivongurin í abour ímóti, og nógvir bretar halda, at kortið er enn ein roynd hjá myndugleikunum at skerja tað persónliga frælsið. Stjórnin hevur lagt dent á, at samleikaprógvið eisini er eitt lið í bardaganum ímóti yvirgangi.

Onnur lógaruppskot, sum fara at fáa harða mótstøðu, snúgva seg um nýskipanir innan skúlaverkið, heilsuverkið og almannaverkið. Eygleiðarar í London siga, at Blair ætlar sær at fremja tey nógvu uppskotini fyri at fáa bretar at minnast hann fyri annað enn kríggið í Irak.

Nakrir tingmenn hjá Labour ætla sær kortini at geva honum stóra mótstøðu fyri at noyða hann at leggja frá sær og at lata Gordon Brown, fíggjarmálaráðharra taka við.

## Vilja hava ísráðharra

Fer norska andstøðan at skipa stjórn aftan á stórtingsvalið í heyst, er tað ikki óhugsandi, at Noreg fær ein ráðharra í ísviðurskiftum, sum tikið verður til.

Miðflokkurin, sum ætlar sær at skipa stjórn saman við Arbeiðaraflokkinum og Sosialistiska Vinstraflokkinum aftan á valið, hevur skotið upp, at stjórnin skal hava ein ráðharra, sum skal umsita viðurskifti í teimum norðastu økjunum. Sambært flokkinum hevði ráðharrin fingið fleiri týðandi evni at viðgera so sum umhvørvi, orku og trygdarpolitikk.

Arbeiðaraflokkurin og Sosialistiski Vinstraflokkurin taka undir við uppskotinum hjá Miðflokkinum. Sagt verður, at tað ætlaða ráðharrastarvið fer at líkjast tí hjá Jens Evensen í sjeytiárunum. Hann var havrættarráðharri, og norskir viðmerkjarar eru á einum máli um, at tað var ein sera skilagóð avgerð at lata ein ráðharra umsita havrættarviðurskiftini burturav tá, skrivar Aftenposten.

## Avsannaði skuldsetingar

Amerikanskir politikarar hava lagt bretska tingmannin George Gallooway undir at hava fingið væl burtur úr olju fyri mat-skipanini, sum STb setti í gildi ímóti Irak aftan á Flógvakríggið. Tað var ein nevnd hjá senatinum, sum kom við skuldsetingunum, men George Galloway sigur, at als einki hald er í teimum.

- Eg selji ikki olju og havi ongantíð gjørt tað, og eingin hevur nakrantíð selt olju mína vegna, segði George Galloway, tá hann fyrradagin hitti senatsnevndina.

- Satt at siga havi eg ongantíð sæð eina oljutunnu, og eg havi heldur ongantíð átt ella selt eina, segði bretski parlamentslimurin, sum fýltist á, at ein nevnd hjá amerikanska senatinum almannakunnger slíkar upplýsingar uttan at tryggja sær, at nakað hald er í teimum.

## Tørvur á javnstøðunevnd

Radikali Vinstraflokkurin í Danmark heldur, at Fólkatingið eigur at hava eina javnstøðunevnd.

Lone Dybkjær, sum er framsøgumaður floksins í javnstøðumálum, sigur í samrøðu við Politiken, at fakfeløg, kvinnufelagsskapir og onnur hava víst á, at alt ov lítil dentur verður lagdur á at tryggja javnstøðu ímillum menn og kvinnur í tí politiska arbeiðinum. Eitt nú verður alt ov lítið gjørt við at kanna, um lógir fáa størri ávirkan á annað kynið enn hitt, sigur hon.

Uppskot um javnstøðunevnd hevur verið í Fólkatinginum fyrr, men undirtøka hevur ikki verið fyri tí higartil. Undir einum orðaskifti í Fólkatinginum fyri einum mánað síðani nevndi Lone Dybkjær tankan, men tá vóru tað bara Sosialistiski Fólkaflokkurin og Eindarlistin, sum søgdu seg taka undir við henni. Kortini hevur hon gjørt av at leggja eitt uppskot til samtyktar fyri tingið.